Løgmaður í Lista G-málinum:

— Eg havi borið meg rætt at

Atli Dam hevur gjørt eitt mistak, sum eigur at rættast, siga andstøðuflokkarnir

Varð valt undir rættum fortreytum við seinasta val, ella merkir dómurin, sum løgmaður fekk í lista G-málinum, og sum hann valdi ikki at skjóta inn fyri hægri rætt, at spurnartekin kann setast við, um vit liva í einum rættarsamfelag?

Hesir báðir spurningar vóru mest frammi undir orðaskiftinum á tingi um uppskoti frá framburðsflokkinum um útskriving av nývali. Málið fær nú viðgerð í einari serliga fimm manna nevnd.

Situr lógliga

Atli Dam, løgmaður, legði dent á, at hann í hesum máli hvørki hevur tikið politiska ella persónliga avgerð, men at tað er løgmannssessurin sum so, ið hevur tikið avgerðina, grundaða á løgfrøðisligt tilmæli frá serfrøðingum, bæði í Tinganesi og í danska innanríkismálaráðnum.

Løgmaður legði somuleiðis dent á, at valið í 1974 varð hildið undir táverandi fortreytum, og at veljararnir kendu avgerð løgmans í lista G-málinum, at tað vórðu tveir tjóðveldislistar.

— Løgtingið hevur síðani góðtikið valbrøvini, og tað situr ti lógliga. Samstundis er tað hægsta vald, segði løgmaður.

— Varð atkvøtt undir øðrum fortreytum, so veit eg ikki, hvussu úrslitið hevði verið, legði løgmaður aftrat. Hann segði, at við dómsúrskurðinum hevur løgmaður fingið konstaterað, at dómarin hevði eina aðra áskpðan enn hana, sum løgmaður hevði undan valinum.

Rættar ikki skeivleikan

Um spurningin at útskriva val og hví hann ikki hevur skotið dómin inn fyri hægri rætt, segði løgmaður:

— Eg meti ikki, at tingið situr ólógliga, og tað er hægsta vald. Eitt val fer ikki at rætta tann skeivleika, sum eg havi gjørt. Tingið hevur sjálvt avgerð í málinum. Eg haldi, at eg havi borið meg rætt at.

Løgfrøðingur: Óneyðugt uppskot

— Hetta er eitt álvarsligt mál, og løgmaður hevur avgjørt ikki at appellera, tí danskir serfrøðingar hava mælt honum frá, segði uppskotsstillarin, Kjartan Mohr. Hann segði, at tingið fekk valbrøvini undir skeivum fortreytum, men at tað hevur sitið í tvey ár, kanska við ti í væntu, at løgmaður fór at vinna.

— Men nú er nýggj løgtingsseta byrjað, og dómur fyriliggur. Dómsvaldið mugu vit virða, segði Kjartan Mohr, sum helt, at løgmaður átti at útskrivað nývalið. Hann segði, at ein eldri føroyskur løgfrøðingur hevur víst á, at eftir fyriliggjandi umstøðum skuldi verið heilt óneyðugt at lagt nakað uppskto fram í málinum, tí landsstýrið átti at tikið av leiðingarnar og lagt frá sær.

Ikki við vilja

Hvørki Pauli Ellefsen, úr sambandsflokkinum, ella Hilmar Kass, úr sjálvstýrisflokkinum, hildu, at løgmaður hevði gjørt nakað skeivt við vilja, men vístu á, at talan var um eitt mistak, sum átti at rættast.

Pauli Ellefsen segði, at tingið við dóminum hevur fingið prógv fyri, at tað situr ólógliga, og hann mælti til, at stig verða tikin til at broyta tingsamansetingina, sum hann segði broytir eins nógv og eitt nýval. Annars hevði Pauli Ellefsen einki ímóti einum vali, segði hann.

Sambandsmaðurin gjørdi greitt, at vórðu nevndu stig ikki tikin, so fór hann at atkvøða fyri uppskotinum frá framburðsflokkinum.

Ábyrgdarleyst

Hilmar Kass segði, at løgmaður hevur mistikið seg við ikki at skjóta málið inn fyri hægri rætt, og tað er ábyrgdarleyst. Hann helt, at tað minsta átti at verið at tikið støðuna upp til nýggja

Framhald á síðu 8

Við loyvi frá Prísráð Føroya eru hesi

Flutningsjøld

fyri persónkoyring í og frá Tórshavn galdandi frá 7. august. 1976:

					kl. 6—22	22—6	
			Býtúrar (beinleiðis uttan steðg)		14	18	
Strond	**Hoyvíksvegur**	**Varðagøta**	**Marknagilsvegur**	**Landavegur**			
Bukvald	Tjaldursvegur	Oyggjarvegur	Typuhúsvirkið	Marknagilsvegur	15	20	
Portrið		J. Reinert		Velbastaðvegur	16	21	
Argir	**Sundsvegur**	**Hoydalsvegur**	**Velbastaðvegur**	**Oyggjarvegur**			
Brúgvin	U. Svartafossi	R.C. Effersøesg.	Heygsvegur	Varðagøta	15	20	
Rosságøta	Birnugøta	Brúgvin	Landavegur	Erling Jacobsen	16	21	
Vegristin	Óluvugøta	Arne Michelsen	Gl. riðingarbreyt	Vegristin	18	23	
(Traðargøta)							
	Brúgvin	Snobb-hill	Vegristin	Ríðingarbreytin	20	25	
		Royndarstøðin	Havnadalsvegurin	Marknagil	22	27	
	Hoyvíksgarður	**Hvítanes**	Sandá	Kleynisvarði	24	31	
Minuttir	kl. 6—22	22—6	Ruskstøðin		27	35	
10	14	18	Velbastaðhálsur	Syðradalsvegurin	30	40	
15	18	24	**Velbastaður**		35	45	
20	24	32	Kallanes	lendingin	Norðara Skarð	40	50
25	30	40	**Sund**	**Kirkjubøur**	Mjørkadalur	50	65
30	36	48			Hórisgøta	55	70
35	42	56			Samfelli	65	85
40	48	64			Esso-støðin	75	100
45	54	72		Leynavatn		80	105
50	60	80		**Leynar**	**Kollafjørður**	85	110
55	66	88			skúlin/**Signabøur**	90	115
1 tími	72	96		**Kvívík/Skæling**	**Kjalnes**	95	125
					Hósvík	115	150
					Áir	125	165
				Vestmanna		130	170
					Hvalvík	135	175
					Streymnes	140	180
					Brúgvin um Streym	145	190
Norðskála						150	195
Svínáir/Oyri					Langasandur	155	200
Ljósá					Saksun/Haldars.	170	220
	Funningsbotnur					180	235
Eiði		Skálabotnur			Tjørnuvík	185	240
	Elduvík	Skála		Skipanes		200	260
	Hellurnar			Søldarfjørður		205	265
	Oyndarfjørður				Gøta	210	275
Funningur				Glyvrar		215	280
Gjógv		Strendur		Runavík	Lamba	220	285
		Kolbeinagjógv		Toftir		230	300
				Rituvík/Nes	Fuglafj./Leirvík	235	305
		Morskranes		Æðuvík		240	310
		Selatrað				250	325

—— Frí- og halgidagar +2 kr. pr. túr. ——
Gerandisdagar kl. 24—6 +2 — — —

AKSTURVINNUFELAGIÐ SAMFYLKING
Auto Mini-Taxi Bil
Akstur-Bil Havnar-Taxi